# beiði



**Hóast arbeiðini kunnu vera ymisk støðd og tíð, er tað altíð ein fantastisk gleði, tá ein kann njóta tað lidna arbeiðið og kann hyggja eftir einum væl laðaðum garði**

## Tol, tol og tol

Heilt síðani Regin Jóanesarson var 14 ára gamal hevur hann arbeitt úti, - fyrst við vegarbeiði og síðani arbeitt fyri seg sjálvan við maskinu og hond.

Ein avgjørd fortreyt fyri slíkum arbeiðum, og serliga tá talan er um at laða ein garð, er eygað: At hava eitt gott eyga, sum sær linjurnar og møguleikarnar í tí einstaka steininum.

- Men tað er kortini eitt ið krevst í hesum arbeiðinum, og tað er tol, tol og aftur tol, slær Regin fast.

At hann bæði hevur handalagið, køna eygað og tolið við sær í arbeiðinum, er vakri garðurin rundan um Meinigheitshúsið á Skála eitt prógv um.

## Dia dugir

Ein annar kendur grótlaðari er Dia Jacobsen úr Leynum.

Teir hava arbeitt saman, og her hevur leynamaðurin verið hentur í ráðum hjá vestmenninginum.

Regin hevur tí sera nógv gott at bera starvsfelaga sínum fyri hansara nærlagni og dugnaskap.

- Jú, Dia, hann er óførur. Hann dugir, slær Regin fast.

Meðan Regin hevur arbeitt nógv fyri Fuglafjarðar kommunu, hevur Dia gjørt stórarbeiði fyri Sørvágs kommunu.

- Vit kendust frá fyrr av, og hevur hann verið ein sera góð inspirasjón hjá mær. Vit arbeiddu saman fyrr, men tey seinnu árini hava vit arbeitt hvør sær, greiðir Regin frá.

**HANDVERK**

*Tað krevur sín mann og gott tol at laða ein garð. Men garðurin her við Meinigheitshúsið á Skála er eitt gott prógv um, at fram kemur hann ið hóvliga ferð. - Ja, ein grótlaðari má hava gott tol, sigur Regin Jóanesarson*